Tíðarkarmar til skrivligu jólaroyndina 2023 í 8. flokki

Jólaroyndin verður avgreidd í O365 umvegis wiseflow í døgunum 4.-7. desember 2023.
Royndarhaldið fer fram í Niðristovu. Møtt verður til 1. tíma.

Støddfrøði			
Mánadagur	**4. desember 2023**		
08:15 - 09:15	Fimisrokning		
09:15 – 09.45	Steðgur		
09.45 – 13:45	Greiðslurokning		

Føroyskt			
Týsdagur	**5. desember 2021**		
08:15 – 09:45	Máluppgáva		
09:45 – 10:15	Steðgur		
10:15 – 13:45	Framseting		

Danskt			
Mikudagur	**6. desember 2023**		
08:15 – 09:45	Máluppgáva		
09:45 – 10:15	Steðgur		
10:15 – 13:45	Framseting		

Enskt			
Hósdagur	**7. desember 2023**		
08:15 – 09:45	Máluppgáva		
09:45 – 10:15	Steðgur		
10:15 – 13:15	Framseting		

Reglugerð fyri jólaroyndina 2023 8. fl.

Umráðandi er at vera væl hvíld/ur og væl fyrireikað/ur.

1. Møtt verður 15. min. áðrenn royndin byrjar.
2. Hav øll neyðug amboð við - handbøkur, frymlar, rokniamboð, skriviamboð.
3. Ábyrgd fyri egnari læring. Næmingar taka ábyrgd og gera sítt besta.
4. Hav einki við, sum kann órógva.
5. Framseting. Uml. 450 vælvald orð. (Næmingarnir skulu sita min. 2,5 t. tímar til fø. og da. framseting, 2 t. til en. framseting.)
6. Framsetingin verður skrivað í Word-tekstviðgerð, goymd sum pdf og uppsend í Wiseflow á Office 365.
7. Tørvar tær pappír, ella skalt tú á vesi, ger tú vart við teg við at rætta hondina upp.
8. Uppgávurnar í FIMISROKNING verða svaraðar á telduni. Tað er ikki loyvt at nýta roknimaskinu. Loyvt er at brúka gulubók/frymlar.
9. Uppgávurnar í GREIÐSLUROKNING fer fram á pappíri. Kladdupappír og innføringarpappír verður útvegað, og loyvt er at nýta gulubók og roknimaskinu umframt hini rokniamboðini. Førast skal inn við svørtum penni. Navn og síðutal skal skrivast á hvørja síðu. (Næmingarnir skulu sita í tveir tímar, áðrenn innføringarpappírið verður útvegað).
10. Til ber at hava matpakka við og stillisliga fáa sær.
11. **Næmingar skulu ikki samskifta sínámillum í royndarhølinum. Næmingar skulu ikki heldur á nakran hátt samskifta við onnur uttan fyri prøvtøkuhølið. Ein kassi stendur í royndarhølinum at leggja tlf. í.**
12. **Tað er ikki loyvt at spæla spøl ella hyggja at filmi í royndarhølinum.**
13. Um næmingurin ikki heldur seg til galdandi reglur, kann hann verða burturvístur úr royndarhølinum, og heimið verður kunnað um hetta.

GÓÐA EYDNU.